UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Dagfesting: **3. november 2021**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 21/08502-39**

Svar

upp á

skrivligan fyrispurning nr. 52-062/2021 frá Jóhannis Joensen, løgtingsmanni, settur Jenis av Rana, landsstýrismanni í uttanríkis- og mentamálum, eftir § 52a í Tingskipanini. Um lærugreina- og skeiðstilboð á Setrinum.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Nær verður møguleiki at nema sær svimjilæraraprógv á Námsvísindadeildini aftur?
2. Hvussu nógvir lærarar hava tikið svimjilæraraprógv á Námsvísindadeildini seinastu 10 árini?
3. Nær verður møguleiki at nema sær telduvarðarútbúgving aftur?
4. Nær verður møguleiki at nema sær serlæraraútbúgving aftur?

Svar

Til 1: Lesandi á Námsvísindadeildini, bæði læraralesandi og námsfrøðingar, hava møguleika at taka svimjilæraraprógv. Svimjilæraraprógv er partur av linjulærugreinini "ítróttur" á læraraútbúgvingini, og í linjulærugreinini "heilsa, kroppur og rørsla" á námsfrøðingaútbúgingini. Báðar hesar linjulærugreinir eru væl umtóktar, og tí eru skeiðini oftast fullteknað við teimum lesandi á linjunum, og tá eru eingi tøk pláss til stakgreinalesandi.

Tá tøk pláss hava verið á linjunum, hava tey verið boðin út bæði til lesandi á øðrum linjum og eisini til lærarar ella námsfrøðingar, sum ynskja at taka svimjilæraraprógv sum stakgreinalestur. Sostatt hava allir lærarar við ítrótti á linju altíð, eisini seinastu árini, havt høvi at taka svimjilæraraprógv.

Tað er ein ávísur tørvur á at skipa svimjilæraraprógv sum eftirútbúgving, og tí hevur leiðslan á Námsvísindadeildini tikið avgerð um, at svimjilæraraprógv verður eitt av eftirútbúgvingartilboðunum, sum verða boðin út sum eftirútbúgving á Fróðskaparsetrinum komandi lestrarár.

Til 2: Seinastu 10 árini hava tilsamans 106 lesandi staðið svimjilæraraprógv. Av hesum eru 69 læraralesandi. Harumframt taka í ár 33 lesandi svimjilæraraprógv, og av teimum eru 20 læraralesandi.

Til 3: Landsstýrismaðurin hevur sett í verk arbeiði at fyrireika eina KT-verkætlan fyri alt skúlaverkið. Her verða gjørdar ymsar umraðfestingar í arbeiðinum hjá KT-vørðum, serliga við atliti at býtinum millum tøkniliga og námsfrøðiliga partin. Ætlanin er at bíða við at seta eftirútbúgving fyri KT-vørðar í verk til hesi viðurskifti eru fingin í rættlag.

Til 4: Landsstýrismaðurin arbeiðir við at gera eina ætlan yvir eftirútbúgvingartørv í fólkaskúlanum. Mentamálaráðið hevur í trimum førum skipað fyri serlæraraútbúgving í 1987, 2000 og í 2012. Harumframt hava lærarar fingið møguleika at taka útbúgving sum serlærari sum fjarlestur. Tørvurin innan serundirvísing og serligan tørv er stórur, og tí verður serlæraraútbúgvingin raðfest, hóast tað ikki eru gingin so nógv ár, síðani ein flokkur tók eftirútbúgving sum serlærarar. Tað eru eisini aðrar serútbúgvingar, sum rættiliga stórur tørvur er á m.a. KT-varðaútbúgving og skúlabókavarðaútbúgving.

Vinarliga

Uttanríkis- og mentamálaráðið

Jenis av Rana
landsstýrismaður